Tað ræður um at fáa drekan burtur

Vága Sjónleikarafelag sýnir í vikuni barnaleikin »Tann hási drekin« í skúlanum á Giljanesi, sum er danskur ævintýrleikur, ið týddur er til føroyskt

SJÓNLEIKUR
Edvard Joensen

Vágar:
Talan er í stuttum um ein ævintýrleik, ið snýr seg um at fáa ein dreka, sum hevur ringt seg kring býin, burtur. Fólk eru avbyrgd og troytt av hesi forðingini fyri sambandi við umheimin.

Vága Sjónleikararfelag sýnir hesa vikuna ein barnaleik í fimleikarhøllini í skúlanum á Giljanesi. Talan er um barnaleikin »Tann hási drekin«, sum danin Benny Andersen hevur skrivað, og Dánjal Jákup Jørgensen í Miðvági hevur týtt til føroyskt. Leikurin verður sýndur hvørt kvøld hesa vikuna. Allar sýningarnar byrja klokkan 19.00.

Mikkjal politistur noyddist at leggja øll síni evni í ein stóran leiklut, sum viðhvørt kundi tykjast í so langrøkin
Mynd: Edvard Joensen

Ringar umstøður

Umstøðurnar at spæla sjónleik í eini fimleikarhøll uttan fastan pall eru vánaligar. Tað merkir eisini framførsluna. Ein improviseraður pallur má setast á gólvi í høllini. Eitt tjald verður hongt frammanfyri, og so mugu fólk bara fáa sum frægast burturúr.

Alt, sum hendir handan tjøldini, fer beinleiðis út til áskoðararnar og kann soleiðis virka eitt sindur órógvandi. Og tá pallurin skal skiftast í steðginum, verður tað gjørt gjøgnum somu dyr, sum áskoðarar, ið fara at strekkja sær beinini, ganga út og inn ígjøgnum. Tað eru avgjørt ikki tær bestu umstøður at leika undir og staðfestir ein sera stóran tørv á einum rættiligum leikpalli í Vágum. Av tí, at eingin pallur er, hevur eisini verið vant í læntum hølum í einum virkisbygningi á havnarlagnum í Miðvági.

Hugurin at spæla sjónleik í Vágum er góður, hóast teimum væntar mannligar leikarar, sigur Marjun í Kálvalíð, sum hevur sett leikin um hása drekan upp. Tveir av høvuðleiklutunum eru tveir ungir dreingir, sum kortini neyðugt var at fáa tvær ungar gentur at leika, tí dreingir fingust ikki. Men í aðrar mátar tykist ikki nakar trupulleiki at fáa fólk til allar leiklutirnar. Onkur teirra hevur tveir leikarar, sum skiftast annaðhvørt kvøld, leikt verður.

Leikgongd

Vit koma beinleiðis inn á eina gøtu í býin, sum eftir sum skilst, sum leikurin líður, er kringsettur av einum dreka, sum ikki letur fólk fáa samband við umheimin. Vit eru í einum ævintýrleiki, sum ætlaður er børnum.

Ein løgreglumaður - sum ikki verður lýstur sum heimsins gløggasta menniskja - hevur trupulleikar av at fá einar tveir ungar kúllar undir lás og slá.

Tað gongur eitt sindur striltið at koma í gongd. Av einum barnaleiki at vera, tykist tað, sum byrjanin er ov trilvandi til, at tað fangar børnini beinanveg. Tað setir stór krøv til leikararnar, sum skulu spæla væl og nógv fyri at koma burtur úr tosinum, ið verður í meira lagi, tí pallmyndin skiftir einki.

Mikkjal politistur, sum Jóhan H. í Kálvalíð Jacbsen, leikar, royndi av øllum alvi at geva leikinum lív. Men tað dovnaði líkasum eitt sindur burtur av leiklutunum hjá teimum báðum kúllunum, sum ungu genturnar, Julia í Kálvalíð og Eyðbjørt Simonsen, tó kláraðu heilt væl. Men teirra leiklutur, hesin við líkasæla ungdóminum, sum einki tímir uttan at vera tvørur, taka líkasum eitt sindur av sprellinum úr leikmyndini.

Í seinna parti kemur meira lív í, tá vit hitta drekan, sum leikurin snýr seg um. Eitt neyðardýr, sum er upptornað og er vorðin hásur av at spræna eld, hvørja ferð onkur togar í halan á honum. Við tí úrsliti, at eldur kemur í fleiri hús í býnum.

Men við eini billast av vatnmelónum fær unga Karin hjálp øllum burtur úr hesum trupulleikanum. Drekin, sum hevur ringt seg kring býin, avtalar við Karina, at hann einaferð árliga skal koma eftir vatnmelónunum, og annars skal hann lata býin hava frið.

Ein eitt sindur øðrvísi drekasøga enn tann um prinsarnar á hvítum hestum, sum bjarga slottum og ungum prinsessum.

Men ein ung prinsessa var kortini at síggja á palli á Giljanesi hetta kvøldið, leikurin var frumsýndur.

Tað var Kristina Christoffersen, sum kom heilt væl frá leiklutinum sum Karin. Frí og óávirkað leikti hon sín leiklut, sum hon kortini skal skiftast við annan leikarar um annaðhvørt kvøld. Tó var hon eitt sindur óklár, tá sungið varð.

Leikararnir vóru í aðrar mátar klárir og hoyrdust væl. Tó var onkur, sum helst átti at lært tekstin eitt sindur betri, áðrenn farið varð á pallin. Kanska vóru eitt sindur av nervum uppi í hesa fyrstu ferðina, tey vóru á palli.

Okkurt skemtligt innslag var lagt inn í leikin eftir at hann er týddur av fyrstan tíð. Eitt nú varð borgarstjórin í drekabýnum allan vegin nevndur eftir borgarstjóranum í Miðvági.

Pallmyndin er klassisk, har leikararnir eru á eini gøtu í býnum og uttan fyri, har drekin liggur. Men eisini ákoðarin er við í leikinum á tann hátt, at allan vegin í kring høllina er hesin stóri drekin málaður og liggur og ringir seg kring áskoðararnar.

Leikurin er í tveimum pørtum og varar við steðgi umleið fimm korter.

Tann unga Kristina Christoffersen sýndi evni sum sjónleikari í barnaleikinum, sum sýndur verður á Giljanesi alla vikuna
Mynn: Edvard Joensen

Fakta

Tann hási drekin
Leikur í 2 pørtum eftir Benny Andersen
Týtt hevur Dánial Jákup Jørgensen

Leikarar eru:
Mikkjal politistur: Jóhan Herlon í Kálvalíð Jacobsen
Karin: Kristina Christoffersen/Jona Ásvør Samuelsen
Niels : Julia í Kálvalíð Jacobsen
Sørin: Eyðbjørt Simonsen
Drekin: Rani Skaalum
Fútin: Jónleif Jørgensen
Omman: Tórfríð Weihe Hansen
Borgmeistarin: Ludvík Laksafoss
Grønmetishandlarin: Kristina Christoffersen/-Jona Ásvør Samuelsen
Eldsløkkjarar: Elsa Annika Olsen og Beinta Zakariasen

Leiktjøld: Ludvík Laksafoss
Leikstjóri: Marjun í Kálvalíð
Hjálparleikstjórar: Eyðbjørt Simonsen og Ludvík Laksafoss
Ljós: Niels Nielsen og Harald í Kálvalíð Jacobsen
Teskari: Beinta Zakariasen

Suðuroyingar vilja ikki sita tigandi longur

Suðuroyingar fara at skipa eina samferðslunevnd. Og hon fær nóg mikið at tríva í

SAMFERÐSLA
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Suðuroyingar vilja ikki sita tigandi longur. Tí nú vilja teir hava ávirkan.

Ferðasambandið ímillum Suðuroynna og Havnina er so ótrygt, at tað er ótolandi hjá vanligum fólki. Ikki minst er tað ótolandi hjá vinnulívinum.

Páskaaftan kallaði ferðavinnan í Suðuroy bæði kommunupolitikarum og landspolitikarum á fund at viðgerða samferðsluna til og úr Suðuroynni.

Útslitið av fundinum var, at suðuroyingar skulu seta eina samferðslunevnd at arbeiða við samferðslu ímillum Suðuroynna og meginøkið, bæði í sjónum og í luftini.

Og eftir tí, sum kom fram á fundinum, verður nóg mikið at tríva í.

Nevnt var, at summir túrar hjá Smyrli liggja illa fyri. Tað varð eisini nevnt, at tyrlan átti at flogið meir.

Suðuroyingar fýltust eisini á, at tað vóru so nógvar broytingar í ferðaætlanini, tí túrar vórðu fluttir í tíð og úrtíð og at tað er ómøguligt hjá fólki og vinnu at fylgja við øllum broytingunum.

Men tað kom eisini fram, at suðuroyingar vilja ikki longur finna seg í, at Smyril næstan altíð er seinkaður av Havnini, tí sáttmálaviðurskifti gera, at manningin sleppur ikki til arbeiðis fyrrenn beint áðrenn at skipið skal sigla.

Teir vilja heldur ikki finna seg í, at Smyril ferð eftir verkfalli verður raktur av verkfalli. Og tá ið hann ikki er raktur av verkfalli, verður hann hóttur við verkfalli.

– Hetta er so ørkymlandi, at mett var, at hetta er ein forðing fyri vinnulívinum, tí fyritøkur aftra seg við at setast niður í Suðuroynni, tí at ferðasambandið varð so ótrygt.

Og suðuroyingar vilja heldur ikki finna seg í, at Smyril ikki fær fast pláss í Havnini.

Alt hetta eru spurningar, sum nýggi samferðslubólkurin, sum skal mannast við ferðavinnuni, vinnulívinum, ítróttarfeløgum og øðrum, sum hava áhuga í ferðasambandinum. Men ætlanin er eisini, at Strandferðslan skal við í bólkin.

Tað verður ferðavinnan, sum skal taka stig til at seta bólkin og fyrsta uppgávan verður at ávirka ferðaætlanina, sum skal setast í gildi í næstu framtíð.

Á fundi, sum ferðavinnan í Suðuroy skipaði fyri leygardagin, komu nógv viðurskifti fram, sum suðuroyingar eru ónøgdir við. Her eru tað Hergeir Nielsen, vm. Elberg Klettheyggj, sum umboðaði ferðavinnuna fyri Hvalbiar Kommunu, Óli Holm, Orðstýrari og Póla Strøm á kunningarstovuni á Tvøroyri, sum var ein av stigtakarunum

Smyril inn í krókin og Norrøna út úr Havnini

– Tað besta hevði verið at Landsstýrið yvirtók atløguplássið hjá Norrønu í Havn og at Norrønu fekk fast atløgupláss onkra aðrastaðni enn í Havn, heldur løgmaður

SUÐUROYARSIGLINGIN
Áki Bertholdsen
Aki@sosialurin.fo

Nýggi Smyril skal yvirtaka atløguplássið hjá Norrønu í Havn og nýtt atløgupláss skal finnast til Smyril onkra aðrastaðni, enn í Havn.

Tað heldur Jóannes Eidesgaard, løgmaður.

Páskaaftan kallaði ferðavinnan í Suðuroy kommunupolitikarum og landspolitikarum saman til fundar at viðgera samferðsluna ímillum Suðuroynna og Havnina.

Ein partur av hesum fundi var um trupulleikan, sum hevur staðist av at finna nýtt atløgupláss til nýggja Smyril í Havnini.

Einasta boðið í løtuni upp á eina loysn, er ætlanin hjá Tórshavnar Havn at spreingja og dýpa framvið framvið Tinganesi fyri at gera atløgupláss til nýggja Smyril á Bursatanga, uttaná Norrønu.

Hinvegin hevur fornminnanevndin heitt á landsstýrismannin í mentamálum at økisfriða Tinganes heilt út á 10 metra dýpi.

Men á fundinum í Suðuroy vísti Løgmaður á, at sama um Tórshavnar Havn fær loyvi til at dýpa framvið Tinganesi ella ikki, so er tað ein vánalig loysn at troka tvey so stór skip inn á Bursatanga.

– Tað er púra burturvið at gera atløgupláss til nýggja Smyril uttan á Norrønu, heilt inni ímóti landi.

– Hetta eru tvey skip, sum tilsamans hava eitt virði upp á eina heila milliard og tað er ikki skilagott at troka tey inn á eitt so lítið øki, sum talan her er um, segði Løgmaður.

Hann vísti eisini á, at verður hendan losnin vald, fer tað at elva til trupulleikar kortini, tí at Norrøna kann undir øllum umstøðum ikki koma at bryggju, tá ið Smyril liggur í sínum atløguplássi og hann ivaðist í, um Smyril kundi koma at, tá ið Norrøna lá í sínum plássi.

Men Jóannes Eidesgaard heldur, at størsti trupulleikin er Norrøna.

– Tórshavnar Havn er ov lítil til eitt so stórt skip sum Norrøna, heldur hann.

Hann sigur at hendan morgunin, Norrøna ikki torgaði at bryggju fyri vindi, stóð hann í einum vindeyga í Tinganesi og eygleiddi hana.

– Tá ið hon ikki kundi koma at tann dagin, verða tað nógvir dagar, at hon kemur at liggja úti í Nolsoyarfirði, tí tá var vindurin onki at tosa um, segði Jóannes Eidesgaard.

– Eg haldi sostatt, at Tórshavnar Havn av álvara eigur at umhugsa at finna Norrønu eitt annað atløgupláss uttanfyri Havnina, segði løgmaður og at Smyril kemur at fáa fast pláss, har Norrøna nú hevur atløgupláss.

Norrøna av Havnini

Jóannes Eidesgaard heldur sostatt, at nógv tann besta loysnin hevði verið at funnið Norrønu eitt fast atløguplás onkra aðrastaðni enn í Havn og at Smyril fekk fast atløgupláss inni í krókinum, har Norrøna nú liggur.

– Tí kann tað væl verða, at næsta útspælið frá landsstýrinum verður at biðja Tórshavnar Kommunu um samráðingar um at lata Landskassan yvirtaka ferjuleguna og landgonguna, sum er gjørd til Norrønu inni á Bursatanga.

Men so má ein onnur loysn finnast fyri Norrønu, men tann loysnin liggur ikki í Havnini, sigur løgmaður.

Henrik Old skoytti uppí, at skiparanir á Smyrli eru ikki fegnir um loysnina, sum Tórshavnar Kommuna ætlar at seta í verk við atløguplássi til nýggja Smyril inni á Bursatanga uttaná Norrønu.

– Tað merkir, at Smyril skal bakka at bryggju á einum ógvuliga trongum øki. Og hendir bara tað allarminsta, tá ið eitt skip bakkar á so trongum øki, er róðrið og skrúva tað fyrsta sum tekur og so er Smyril lidugur í longri tíð, tí so má hann av landinum

– Alla aðrastaðni verður roynt at sleppa undan at bakka við so stórum skipum, legði hann afturat.

Skipafelagið rykkja eina skipslongd

Men suðuroyingar hava eisini eitt annað uppskot, verður als ongin møguleiki at fáa Norrønu úr Havnini.

Jógvan Krosslá, borgarstjóri í Vági, helt, at ein onnur loysn kundi verið at tikið samráðingar upp við Tórshavnar kommunu og Vinnumálaráðið um at gera ein ferjuskráa til nýggja Smyril heilt inni í krókinum við Skipafelagið.

Men so mugu allir partar góðtaka, at skipini hjá Skipafelagnum rykkja eina skipslongd longur út á Molan at liggja.

Á ferðavinnufundinum í Suðuroy leygardagin varð víst á, at tað eru bara einstakar ferðir, at Norrøna og Smyril eru á Havnini í senn.

Men hetta er, tá ið ferðaætlanin hjá Norrønu heldur. Er hon seinkað av veðrið, kann hetta skapa enn størri trupulleikar.

– Renna vit okkum í seinkingar hjá Norrønu, verður tað ein hurlivasi av eini aðrari verð, helt Hergeir Nielsen. Hann helt tí, at politiskt trýst eigur at verða lagt á Tórshavnar Kommunu og á Skipafelagið um at rykkja eina bátslongd longur út á Molan, so at Smyril kann liggja í krókinum við Skipafelagið, tá ið Norrøna og hann eru í Havn í senn.

– Á ferðavinnufundi í Suðuroy leygardagin helt Jóannes Eidesgaard, løgmaður, at tað besta hevði verið at Norrønu fekk pláss onkra aðrastaðni enn í Haavn. Henrik Old, løgtingsmaður, vinstrumegin á myndini, og Heri Niclasen,stjóri á ferðaráðnum, lýða á